

*Ein gamal kenningur hjá løgregluni í Vágum var mánanáttina umborð á Akranesi, sum lá á Miðvági, og stjól sterkan heilivág úr medisinkistuni*

Mynd: Edvard Joensen

# Medisinkistan brotin upp

**Innbrot var umborð á einum skipi, sum lá á Miðvági um vikuskiftið. Medisinkistan var brotin upp**

POLITITÍÐINDI

Mánanáttina vórðu sterk pínustillandi evni stolin úr medisinkistuni á Akranesi, sum lá við bryggju í Miðvági. Løgreglan hevur uppklárað málið.

Klokkan gott tvey mánanáttina fekk løgreglan í Vágum fráboðan um innbrot umborð á Akranesi, sum lá við bryggju í Miðvági. Medisinkistan var brotin upp, og heilivágur stolin.

Rímiliga góðar upplýsingar hevði løgreglan og fór á eina adressu í Miðvági, har ein maður varð tikin fyri innbrotið, sigur vakthavandi á politistøðini í Miðvági.

Tað vísti seg, at maðurin einsamallur hevði verið umborð á Akranesi og brotið medisinkistuna upp. Hann hevði verið við bili á bryggjuni, sigur løgreglan.

Og tann koyritúrin verður hann so í fleiri førum ákærdur fyri eisini. Í fyrst lagi fyri at koyra ávirkaður. Bæði av rúsdrekka og øðrum rúsevnum. Í øðrum lagi fyri at hava koyrt bil uttan at hava nakað koyrikort.

Bilin hevði hann lænt frá einum vinmanni, sigur vakthavandi á politistøðini í Miðvági. Og hesin vinmaðurin fær so eisini eina heilsu frá løgregluni í hesum málinum. Nevniliga fyri at lata bilin til ein persón, sum als ikki var førur fyri at koyra bil.

Maðurin, sum var umborð á Akranesi mánanáttina, er gamal kenningur hjá løgregluni í Vágum, sigur vakthavandi.

Løgreglan metir hetta málið sum fult uppklárað.

# Ferðsluóhapp á Kambsdali

**Útrykningur var í Eysturoynni mánamorgunin. Orsøkin var eitt ferðsluóhapp á Kambsdali**

POLITITÍÐINDI

Eitt ferðsluóhapp á Kambsdali mánamorgunin elvdi til stóran materiellan skaða. Men fólkaskaði var eingin.

Løgreglan í Runavík upplýsir, at talan var um eitt óhapp, har ein bilførari ikki helt víkiskylduna.

Hann var á veg út av ídnaðarøkinum á Kambsdali og varnaðist ikki ein bil, sum kom koyrandi eftir høvuðsvegnum. Úrslitið var ein samanbrestur, sum gjørdi stóran skaða á bilarnar. Men persónsskaði var eingin, tað løgreglan visti um fyrapartin mánadagin.

Annars hevur vikuskfitið verið friðaligt í Eysturoynni, sigur vakthavandi á politistøðini í Runavík.

Ítróttargalla við stórari veitslu var í Runavik um vikuskfitið. Har var nógv fólk savnað. Tey hugnaðu sær og høvdu tað stuttligt, og løgrelgan frætti einki meira frá tí, sigur vakthavandi.

**ej**

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Blottari skuldsettur

**Ein ungur maður, sum vísti seg fyri nøkrum stórum smágentum á Argjum í seinastu viku, er skuldsettur fyri blygnaðarskemd í fleiri førum**

POLITITÍÐINDI

*Edvard Joensen*

Maðurin, sum í seinastu viku vísti seg fyri smágentum á Argjum, er nú skuldsettur.

Hósdagin í seinastu viku fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein maður hevði nektað seg framman fyri nøkrum stórum smágentum.

Hetta hendi við eitt byggipláss á Argjum, upplýsir Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini á politistøðini í Havn.

Ein 13 ára gomul genta tók myndir av manninum við fartelefon síni, umframt at hon eisini fekk myndir av bilinum, hann koyrdi í. Løgreglan kundi so lesa nummarplátuna og handtaka mannin.

Maðurin verður nú ákærdur eftir grein 323 í revsilógini um blygnaðarskemd, sigur Bergleif Brimvík. Hann sigur, at hetta er ikki fyrstu ferð, hesin sami maður hevur verið úti um seg.

Hann hevur eisini ein dag í januar verið á sama stað og víst seg. Tá fyri eini 11 ára gamlari gentu.

– Tað kann vera, at hann eisini í øðrum førum, sum vit ikki vita um enn, hevur víst slíkan atburð, sigur leiðarin á kriminaldeildini, sum vil frætta, um so skuldi verið.

Løgreglan metir myndirnar frá fartelefonini sum nóg gott próvtilfar at fara í rættin við, sigur Bergleif Brimvík. So er tað upp til rættin hvat gjørt verður við málið.

Revsiramman kann eftir grein 323 vera upp til fýra ára fongsul fyri tað, sum á lógarmálið verður nevnt blygnaðarskemd. Tó er møguleiki fyri at linka dómin til hefti, bót ella kanska treytaðan dóm, har viðkomandi verður settur í viðgerð, greiðir kriminalleiðarin frá.

Umframt hesar báðar hendingarnar á Argjum, er maðurin, sum nú er skuldsettur, ikki frammanundan kendur av løgregluni.

# Friðaligt vikuskifti

**Løgreglan í Havn sigur frá friðaligum vikuskifti. Okkurt herverk, ferðsluóhapp og annað smávegis**

POLITITÍÐINDI

Tað hevur verið eitt friðaligt vikuskifti, letur vakthavandi á politistøðini í Havn at.

Onkur er tikin fyri at koyra við kenning. Okkurt herverk er fráboðað, og so er eisini onkunstaðni boðað frá húsaófriði, segði vakthavandi á politistøðini í Havn, tá Sosialurin tosaði við hann mánamorgunin.

– Tað tykist, sum húsaófriður og herverk eru við at gerast gerandiskostur, varð sagt av politistøðini.

Eitt minni feðrsluóhapp hevði eisini verið, har ein bilførari breyt treytaleysa víkiskyldu og koyrdi út har, hann ikki átti at koyra. Bert smávegis materiellur skaði hendi, sigur vakthavandi.

**ej**